

*Føroyska svimjiliðið fer at halda til í hesum krókinum á Beau Sejour Leisure Centre komandi dagarnar, og vónandi hava tey nøkur heiðursmerki heim við sær*

# Tey seinastu ígongd

**Føroysku bogaskjúttarnir og svimjararnir, sum vanliga teljast millum føstu heiðursmerkjatakararnir, fóru mánadagin undir sínar kappingar**

OYGGJALEIKIR
*Álvur/Jákup*

**Guernsey:** Eftir at fyrsti kappingardagurin var lokin sunnudagin, vóru tað framvegis trý av føroysku ítróttarliðunum, sum enn ikki høvdu verið í kapping.

Hesi fáa tó ikki nakra langa hvíld av teirri orsøk. Bogaskjúttarnir, svimjingin og fimleikurin høvdu øll sokallaðan venjingardag sunnudagin, men mánadagin var liðugt við venjingini.

Hjá bogaskjúttunum varð farið í holt við liðkappingarnar mánadagin, og gongst sum ætlað - ella kanska vant – so verður helst okkurt heiðursmerki fingið til høldar í hesum.

Somuleiðis kann roknast við, at okkurt fer at spyrjast burturúr hjá svimjarunum. Hesi byrjaðu sínar innleiðandi kappingar mánamorgunin, og longu seinnapartin mánadagin var talan um fleiri finalur, har onkur teirra vónandi hevur føroyska luttøku.

Fimleikakvinnurnar vóru lidnar við sína liðkapping mánamorgunin, og er hetta nærri umrøtt aðrastaðni í blaðnum. Menninir fóru undir sína liðkapping seinnapartin, og eftir vónbrotið og silvur á seinastu leikunum er einki at ivast í, at teir hava sett nøsina eftir gullinum hesaferð.

Akkurát, hvussu tað fer at hilnast hjá øllum hesum, er sjálvandi ilt at meta um, men vónirnar eru í øllum førum til staðar, og her av Guernsey fara vit so at gera eina roynd at fylgja við í øllum tí, sum fyriferst.



*Dia Jacobsen er her í hylinum í royndini at svimja seg víðari í 50 metra ryggsvimjing*



*Gudmund Joensen varð fremsti føroyingurin í triathlon, og tó at hann eins og liðfelagarnir var í seinasta triðinginum av feltinum, so var talan um eitt avbera gott avrik eftir føroysku mátum*



# Hørð mótstøða í triathlon

**Í kapping við væl vandu ítróttarfólkini av kanal-oyggjunum var ikki væntandi, at føroysku íðkararnir kundu blanda seg í oddin, men hóast hetta, so var talan um góð úrslit**

TRIATHLON
*Álvur/Jákup*

Fleiri av bretsku kanal-oyggjunum hava drúgva siðvenju innan krevjandi triathlon kappinginar, og tí var ikki væntandi, at føroysku luttakararnir kundu gera nakað sum helst við fremstu íðkararnar á oyggjaleikunum, og hetta varð so eisini staðfest sunnudagin.

Hóast hetta, so støðu okkara seg heilt væl, og ikki minst fekk Gudmunur Joensen eina góða tíð í einstaklingakappingini hjá monnum. Her hevði vinnandi luttakarin av Isle og Wight knappar tveir tímar um drúgva teinin, sum bæði skal svimjast, súkklast og rennast, og eftir at teir fremstu høvdu lagt nakað av sjógvi til restina, kom eitt hampuliga breitt miðfelt, har Gudmundur eisini var at finna. Fremsti føroyski íðkarin kom á mál við tíðini, 2.24,50. Serstakliga stóð hann seg vææl í svmjingini, har hann ýtti 22 minuttir og 46 sekund í briminum í Ermasundi. Súkklingin tók honum 1.16,02 meðan renningin var liðug eftir imponerandi 46,02.

Tríggir aðrir føroyingar tóku eisini lut hjá monnunum. Beinir Rasmussen, sum serliga er stinnur á hjólhestinum, kom á mál sum nummar 41 í tíðini 2.28,30. Og Kári Simonsen og Eyðtór J. Joensen komu á mál sum ávíkavist nummar 45 og 46 av teimum í alt 47 íðkarunum, sum gjøgnumførdu kappingina.

Hjá kvinnunum vóru Føroyar umboðaðar við Elisabeth M. Johannesen, og hon kom á málið sum nummar 20 av 22 luttakarum. Her var Melissa Messervy av Jersey annars fullkomuliga einaráðandi, og kom hon á mál knappar seks minuttir undan silvurvinnaranum í tíðini 2.10,49. Tíðin hjá Elisabeth var 2.46,44 fyri samlaða teinin. Svimjingin tók henni 28,42, súkklingin 1.21,53 og renningin 56,09. Joan Bláfoss skuldi ætlandi eisini taka lut her, men tað varð so kortini av ongum í hesum umfarinum.

# Tórður fekk ávaring

**Tað verður ikki alla staðni tikið eins væl upp, tá tíðindafólk sjónliga geva til kennar, hvørji hesi halda við**

ÁSKOÐARAR
*Jákup Mørk*

**Guernsey:** Einki er at ivast í, at vit í Føroyum hava nøkur sera íðin frásøgufólk, sum bæði á prenti, máli og í myndum royna at siga frá, tá føroysk umboð royna seg í kapping uttanlands.

Skal nakar takast framum av hesum, so slepst valla undan Tórða Mikkelsen úr Sjónvarpinum, sum nú skjótt má metast sum ein av sonnu veteranunum í oyggjaleikahøpi í so máta.

Spenningur hansara er í minsta lagi eins stórur, og hann er hjá vanligu áskoðarunum, sum eisini eru á staðnum, og hetta fall onkrum álendingum fyri bróstið, tá føroysku flogbóltsharrarnir sunnudagin løgdu fyri við at vinna á tvífalda gull-liðnum.

Um tað var hóttandi tapið hjá Álandi, ella um orsøkin var ein onnur, skal ikki sigast, men í øllum førum vórðu boð givin til eftirlitsfólkini um, at har gekk ein veipandi maður uppi á pressuplássunum, og hetta hildu tey ikki sømdi seg.

- Jú tað er rætt. Har kom ein maður yvir til mín einar tvær ferðir, og segði við meg, at onkur áskoðari var misnøgdur, men hetta fingu vit tó loyst í sátt og semju. Eg greiddi honum frá, at eg sjálvandi helt við Føroyum, nú eg var her niðri sum frásøgumaður, og so segði eg eisini við hann, at eg eftir hondini mátti vera eitt slag av maskotti hjá liðnum. Hesum flenti hann bara at, og so var bara hjá mær at halda á fram við at heppa, seðgi ein flennandi sjónvarpsmaður um hesa heldur sjáldsomu uppliving.

Eftir er so bert at vóna, at tað verður enn meira at fegnast um hjá bæði Tórða og øllum okkum øðrum, sum í hesum døgum fylgja við føroysku umboðunum á staðnum. Í flogbóltinum var byrjanin í øllum førum sum eftir ánni, og so leggja vit helst vertin á, um onkur álendingur mundi fáa ilt av hesum.

## Oyl-støður

### Borðtennis, lið
Bólkur B

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Guernsey | 3 | 3 - 0 | 17 | 4 | 13 | 6 |
| 2 Gotland | 3 | 2 - 1 | 14 | 7 | 7 | 4 |
| 3 Grønland | 3 | 2 - 1 | 11 | 10 | 1 | 4 |
| 4 Føroyar | 3 | 1 - 2 | 11 | 10 | 1 | 2 |
| 5 Áland | 3 | 1 - 2 | 5 | 15 | -10 | 2 |
| 6 Orkney | 3 | 0 - 3 | 4 | 16 | -12 | 0 |

### Badminton, lið
undanbólkur A

| | d | v - t | v dystir | t dystir | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Guernsey | 2 | 2 - 0 | 10 | 0 | 10 | 2 |
| 2 Føroyar | 2 | 1 - 1 | 5 | 5 | 0 | 1 |
| 3 Bermuda | 2 | 0 - 2 | 0 | 10 | -10 | 0 |

### Flogbóltur, kvinnur
Bólkur A

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Føroyar | 1 | 1 - 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 2 Grønland | 1 | 1 - 0 | 3 | 0 | 3 | 3 |
| 3 Caymann | 1 | 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 1 |
| 4 Gibraltar | 1 | 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 1 |
| 5 Hitra | 0 | 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |

### Flogbóltur, menn
Bólkur A

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Áland | 2 | 1 - 1 | 5 | 3 | 2 | 4 |
| 2 Caymann | 1 | 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 3 |
| 3 Føroyar | 1 | 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 3 |
| 4 Jersey | 1 | 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |
| 5 Grønland | 1 | 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 1 |

### Fótbóltur, kvinnur
Bólkur B

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Føroyar | 1 | 1 -0 -0 | 11 | 0 | 11 | 3 |
| 2 Jersey | 1 | 1 -0 -0 | 4 | 1 | 3 | 3 |
| 3 Isle of Wight | 1 | 0 -0 -1 | 1 | 4 | -3 | 0 |
| 4 Isle of Man | 1 | 0 -0 -1 | 0 | 11 | -11 | 0 |